# Verður einki gjørt, fer allur rækjuflotin av knóranum

**- Í altjóða sjógvi eru altjóða fyritreytir galdandi. Sum nú er, hava vit ongan møguleika at kappast við aðrar, sigur skiparin á Arctic Viking, Bjarni Petersen**

RÆKJUFLOTIN
*Vilmund Jacobsen*

*Allur rækjuskipaflotin liggur í andaleypi, men myndugleikarnir lata bara oyruni aftur og eru fullkomiliga passivir. - Hetta sigur Bjarni Petersen, skipari á Arctic Viking, sum mælir til, at ein FAS-líknandi skipan verður gjørd fyri rækjuflotan, sum fiskar í altjóða sjógvi og ikki av føroyskari umbýtiskvotu*



Allur rækjuflotin liggur í andaleypi og teir, sum eiga skipini, vita sær eingi livandi ráð, nú allur flotin stendur til at fara av knóranum. Tvey skip eru longu farin, Ocean Pride, sum er seldur til Kanada og Kappin, sum Rækjuvirkið á Oyri hevur keypt. Tvey onnur føroysk rækjuskip fiska undir fremmandum flaggi.

Føroyski rækjuskipaflotin telir í løtuni 8 skip undir føroyskum flaggi, og tey standa øll – uttan undantak - til at fara av knóranum, um einki verður gjørt frá politiskari síðu til tess at varðveita skipini í flotanum.

### Reinur valuti

Ofta verður spurt, hvat loysir seg at varðveita samfelagsliga, og hvat ikki loysir seg. Lítið man tó vera at ivast í, at føroyska samfelagið verður fátækari, tá ið rækjuflotin er seldur øðrum – ella er flaggaður út.

Bjarni Petersen, skipari á Arctic Viking, sigur, at rækjuflotin í miðal útflytir fyri einar 250 milj. krónur um árið.

- Samanbera vit hetta við tað, sum flakatrolararnir útflyta fyri, er talið hjá flakatrolarunum einar 50 milj. krónur hægri.

Rækjuskiparin vísir á, at øll kvotan hjá flakatrolarunum verður goldin við fiski undan Føroyum, men soleiðis er ikki við rækjunum, sum verða veiddar í altjóða sjógvi.

- Føroyar lata 155.000 tons av svartkjafti fyri veiðirættindini hjá flakatrolarunum og nótaflotanum, tá ið hesi skip veiða uttanfyri 200 fjórðinga fiskimarkið. Hesi skip fáa tískil sína kvotu í útlendskum sjógvi fyri "einki", tí fiskur undan Føroyum rindar kostnaðin. Hinvegin noyðist rækjuflotin sjálvur at gjalda, um teir vilja vinna sær eykakvotur.

Bjarni sigur, at Føroyar lata einki kilo av fiski, ei heldur nakra krónu fyri tað, sum rækjutrolararnir fiska á Flemmish Kap og við Svalbard.

- Hetta eru søgulig rættindi, sum vit sjálvir hava vunnið okkum, leggur hann dent á.

Einastu rækjurnar, sum fiskaðar verða fyri umbýtiskvotu, eru tey fáu tonsini, sum rækjuskipini sleppa at fiska undir Eysturgrønlandi.

- Men líkt er ikki til, at nakar skilir hetta, tí ein rækjutrolari fyri og annar eftir fer á húsagang – uttan at hugt verður eftir, hvat tað er, sum hendir, og hvørjar umstøðurnar hjá flotanum í veruleikanum eru, sigur Bjarni Petersen.

### Undir FAS-skipan

Skiparin heldur, at rækjuflotin hevur so stóran, samfelagsligan týdning, at eitt hvørt átti at verið gjørt frá almennari síðu, so vit ikki missa øll hesi skipini av hondum.

- Vit fiska í altjóða sjógvi í kapping við skip, sum fiska undir altjóða treytum. Tí átti tað ikki at verið órímiligt, at vit eisini sluppu at kappast undir somu treytum, sum hini skipini.

Bjarni leggur dent á, at í altjóða sjógvi, eru altjóða treytir galdandi.

- Sleppa vit ikki at fiska undir somu treytum, sum hinir, hava vit heldur ongan møguleika at kappast við teir, sigur hann.

Skiparin á Arctic Viking heldur tað tí vera so upplagt, at føroyski rækjuskipaflotin sleppur undir eitt slag av eini FAS-skipan, eins og farmaskipini, sum eisini kappast undir altjóða treytum.

Felagið Rækjuskip hevur borið hetta uppá mál yvirfyri landsins myndugleikum, men teir hava higartil skotið seg inn undir, at sleppa rækjuskipini undir eina FAS-skipan, so fara aðrir skipabólkar at krevja tað sama.

- Eg haldi ikki, tað hevði verið órímiligt, um vit fingu eina lóg, sum sigur, at tey skip, sum fiska í altjóða sjógvi – og ikki av umbýtiskvotu – kundu sloppið undir eina FAS-líknandi skipan.

Bjarni Petersen dugir ikki at síggja nakran trupulleika við hesum, nú vit frammanundan hava eina lóg á økinum.

- Men myndugleikarnir lata bara oyruni aftur og eru fullkomiliga passivir. Hetta er óskiljandi, nú ein heil vinna stendur til at fara fyri bakka, sigur hann.

Í blaðnum leygardagin venda vit aftur til støðuna hjá rækjuflotanum.

# Hygg-Inn, kvinna!

**Mathias Davidsen hevur keypt handilin, Hygg-Inn í Saltangará, sum nú hevur broytt navn til Lafamme, ið er franskt og merkir "kvinna"**

HANDIL
*Vilmund Jacobsen*

Í Runavíkar kommunu er ríkt handilslív. Næstan hvørt hús, sum er bygt við høvuðsvegin, er samstundis bygt við handilsvindeygum. Tó eru tað ikki øll, sum búgva við vegin, ið handla, men tey fægstu útihýstu hesum møguleika, tá ið tey lótu húsini byggja.

Av og á skifta handlar eigara, og nýggj andlit eru at síggja aftanfyri diskarnar.

6. mars keypti Mathias Davidsen handilin, Hygg-Inn í Saltangará, frá Dánial Peturi og Duritu Hansen.

Hygg-Inn er klædnahandil, sum hevur lagt seg eftir at selja konufólkaklæði. Málbólkurin er vaksin fólk, ikki børn.

Handilin hevur røtur heilt aftur til sekstiárini, tá ið hann bar heitið, Klædnabúðin.

Dánial Petur og Durita hava átt Hygg-Inn í hálvt triðja ár ella so.

### Broytingar

Nýggi eigarin, Mathias Davidsen, er el-innleggjari og eigur eisini handlarnar, El-tænastan og Tógv og Stokkar, sum húsast undir somu lon í Saltangará.

Á el-virkinum, sum eisini ber heitið El-tænastan, hevur Mathias 7 mans aftrat sær.

Hann sigur, at handilin, Hygg-Inn, verður rikin sum higartil við konufólkaklæðum, men bæði navn og handilin innan verða broytt.

- Hygg-Inn fer nú at eita Lafamme, sum er franskt og merkir "kvinna". Nýggja skeltið er ikki komið upp enn, men tað verður væntandi fyrsta dagin, sigur Mathias.

Hann sigur, at handilin verður eisini broyttur innan. Hølini verða "shinaði", sum hann tekur til og sett í nútímans stand. Øll ljósskipanin verður eisini sett upp av nýggjum.

- Hetta verður alt gjørt so við og við, og longu nú eru onkrar broytingar framdar, sigur Mathias Davidsen.

Handilin, Lafamme, hevur eitt rímiliga stórt úrval av klæðum til konufólk – og er verdur at vitja.

Tvey konufólk arbeiða hjá Lafamme hálva tíð.

Opið er vanligar dagar frá kl. 10.00-17.30 og leygardag frá kl. 10-14.



# Best í kongaríkinum



*8. B í Miðvágs Sandavágs Skúla vann fyrstuhjálparkappingina, sum danska tryggingarfelagið Tryg i Danmark skipaði fyri á internetinum.*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

**Áttandi B á Giljanesi hevur vunnið eina internetkapping, sum danskt tryggingarfelag skrivaði út millum allar áttandu flokkarnar í danska kongaríkinum**

KAPPING
*Edvard Joensen*

**Giljanesi:** Tey eru best í danska kongaríkinum, tá ræður um vitan um fyrstuhjálp. Næmingarnir í áttanda B á Giljanesi.

Í mars mánað skrivaði danska tryggingarfelagið Tryg i Danmark út ein kapping, har áttandu flokkarnir í danska kongaríkinum kundu melda til. Kappingin gekk út uppá, at næmingarnir skuldu svara spurningum um fyrstyhjálp og hvussu teir høvdu borið seg at, um teir komu á staðið, har ein vanlukka var hend.

Marianna Simonsen, sum er flokslærari hjá áttanda B í Miðvágs- Sandavágs Skúla, ið vanliga verður nevndur Skúin á Giljanesi, greiðir frá, at næmingarnir hava gjørt alt arbeiðið sjálvir. Skúlin hevur latið teimum internetsamband í stovuna, og so hava tey klárað restina sjálv. Í felag, leggur lærarin dent á.



*Soleiðis sær heimasíðan út, sum hevur ligið til grund fyri kappingini, sum næmingarnir á Giljanesi vunnu*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

Kappingin varð skipað soleiðis, at næmingarnir skuldu meldast til við hvør sínum loyniorði, umframt at flokkurin fekk eitt loyniorð. Kappingin byrjaði so tann 24. mars og helt á til tann 30. mars á miðnátt. Ta tíðina kundu næmingarnir so hvør í sínum lagi hyggja at, um teir høvdu fingið nakrar spurningar at svara uppá.

Spurningarnir komu ógvuliga spjaddir. Til dømis hevði onkur fingið allar sínar spurningar, áðrenn onnur fingu nakrar. Onkru fekk tveir sama dag o.s.fr.

– Men tey hava verið óført, greiðir Marianna, flokslærari, frá. Og kappingarandin kom veruliga fram eisini.

Onkuntíð hava tey í felag sitið við telduna. Tann, sum svara skuldi, tastaði inn, meðan onnur sótu við bók við síðuna av og svaraðu, so skjótt kundi tastast. Tí tað fór ein klokka í gongd, fyrsta, sum latið varð upp, og hon taldi, til afturlatið var. Tann tíðin skuldi telja við í útrokningini, tá úrslitið skuldi gerast upp.

Samlaða úrslitið varð so funnið við, at hvør einstakur næmingur varð skrásettur við sínum úrsliti. Tað vil siga svarið og tíðin, brúkt varð, og síðan var meðaltalið fyri allan flokkin tikið.

Tá avtornaði, og úrslitið varð kunngjørt á heimasíðuni www.redliv.dk, hevði áttandi B á Giljanesi flest stig av teimum 200 flokkunum, sum luttóku.

Flokkurin fær 25.000,- krónur í høvuðsvinningi. Eisini koma tveir danskir fyrstuhjálparinstruktørar til Føroya at geva teimum eitt tveir daga skeið í fyrstuhjálp.

Eisini átandi A á Giljanesi var við í kappingini, og gjørdist hann nummar 18.

# Felagið Vágar yvirtekur kunningardiskin

**Felagið Vágar fer nú at reka kunningardiskin á flogvøllinum, eins og felagið eisini fer at lýsa eftir fólki til Kunningarstovuna í Vágum**

FERÐAVINNA
*Edvard Joensen*

**Flogvøllurin:** Kunningardiskurin á flogvøllinum verður nú lagdur undir Felagið Vágar, sum rekur Kunningarstovuna í Vágum.

Felagið, sum hevur rikið kunningardiskin seinastu tíðina, gavst mánadagin, og vandi var fyri, at diskurin fór at lata aftur.

Nú hava so Statens Luftfartsvæsen og Felagið Vágar í felag tikið seg saman og reka diskin í felag til eftir páskir. Triðja páskamorgun tekur Kunning-arstovan í Vágum yvir.

Terji Nielsen, kunningarleiðari í Vágum, sigur, at nú verður farið at lýsa eftir fólki til Kunningarstovuna og kunningardiskin á flogvøllinum. Lýst verður eftir tveimum fólkum. Hálvtannað starv verður á flogvøllinum, og eitt hálvt verður á sjálvari Kunningarstovuni aftur at leiðaranum sjálvum, sum fer at halda til har.

Tað eru ferðasmiðir, Ferðaráðið, Felgið Vágar og onnur, sum hava tikið seg saman og fíggjað kunningardiskin á flogvøllinum.

Terji Nielsen, kunningarleiðari, sigur, at áhuga og vælvild hevur ikki skortað uppá. Øll i vinnuni duga at síggja tað avgjørt neyðuga í at hava kunningardkiskin á flogvøllinum.




*Kunningardiskurin verður yvirtikin av Felagnum Vágum triðja páskadag. Til ta tíð reka SLV og Felagið Vágar diskin í flelag*

*Mynd: Edvard Joensen*